

## Heðin heldur fram

Í løtuni er EB/Streymur næstfremst á stigatalvuni, og hóast kappingarárið ikki er liðugt enn, so endaliga úrslitið kann gerast bæði betri og verri, skerst neyvan burtur, at tey í Sundalagnum eru nøgd við avrikini hjá Heðini Askham, sum tók við sum venjari fyrst í august mánaði. Sum skilst, hevur Heðin nú gjørt avtalu við EB/Streym um, at hann heldur fram har næsta kappingarár. Hetta hevur annars verið eitt hendingarríkt kappingarár hjá venjaranum, sum byrjaði í B36, men ikki helt fram kortini. Síðani vann hann við A-landsliðnum á Íslandi, umframt at hann sjálvur annar hevur staðið fyri fráliku úrslitunum hjá U21-landsliðnum, eitt nú sigrinum á Russlandi. Og nú sær so út til, at Heðin Askham eisini fær nóg mikið at takast við næsta kappingarár, við framhaldandi gerandisdegi í fótbóltinum við Margáir.

hil

### 07 Vestur-ÍF 2-2 (2-0)

# Afturstig og framstig

07 Vestur

ÍF

**Liðini áttu meira ella minni hvør sín hálvleik í dystinum í Sørvági í gjárkvøldið, men eina stigið í part var eitt afturstig fyri 07 Vestur og eitt lítið framstig fyri ÍF**




einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen


Tá Jens Erik Rasmussen stutt fyri hálvleik legði 07 Vestur á odda 2-0 eftir góða fríspæling frá Ricardo da Silva Braga, kundi tað sæð út til, at elsti maður á vøllinum mestsum avgjørdi. Hóast meiri enn 45 minuttir vóru eftir, høvdu vága-menn vunnið seg avgerandi fram um fuglfirðingar, men – sum so ofta – skuldi tað vísa seg, at ein 2-0 leiðsla kann vera sera vandamikil og torfør at halda.

Eisini skuldi tað vísa seg, at tað ikki gjørdist elsti spælarin, sum myndaði dystin so nógv, sum yngsti spælarin gjørdi tað. Í øllum førum fekk tað avgerandi týdning fyri úrslitið, at 18 ára gamli Dánjal á Lakjuni kom á vøllin eitt lítið korter inn í seinna hálvleik, tí hann vísti seg at vera stóri undangongu-maðurin á ÍF-liðnum, ið væl og virðiliga bardi seg innaftur í dystin.

Avrikið krýndi hann so við útjavnandi málinum til 2-2, ið var eitt av teimum avgjørt frægaru. ÍF fekk fríspark afturi á egnari hálvum og Pól Ennigarð sendi bóltin út í høgru síðu til Dánjal, ið tamdi bóltin soleiðis, at mótspælarin varð snýttur og fór á glið. Síðani setti unglingin ferð á inn í vøllin og smekkaði til við vinstra beini, so bólturin sang í netmeskinum, heilt uppi í handara málkróki.

### Burtur úr ongum

Hetta útjavnandi málið hevði ÍF sanniliga eisini uppiborið, soleiðis sum dysturin háttaði seg. Fyrst gekk ímóti tíðliga í dystinum, tá fuglfirðingar høvdu fleiri góðar møguleikar, men bara ikki fingu bóltin inn. Størsti syndarin var Nenad Saric, ið stórliga misbrúkti eina annars góða fríspæling frá Andy Olsen.

Fyrstu 20 minuttirnar sá út til, at ÍF nærkaðist fyrsta málinum í dystinum, men í staðin gjørdist tað 07 Vestur, sum beint ímóti dystargongdini fekk hol á. Í einari luftduell fór Tamba Yarjah um koll beint uttan fyri ÍF-brotsteigin, og eftirfylgjandi smekkaði Milan Pejcic frísparkið í málið til 1-0 við einum skoti í besta Súna Olsen-stíli.

Ein góðan minutt eftir málið fekk eisini ÍF eitt fríspark burtur úr ong-um, men hóast Høgni Zachariassen kom hægstur, fekk hann ikki lumpað 07 Vestur-málverjan, Trygva Askham, sum í fullari longd fekk toygt seg og jústað bóltin uppum.

Eftir leiðslumálið setti 07 Vestur seg á spælið og gjørdi tað enntá við manér í løtum. Og stutt fyri stegðin var tað, at Jens Erik vísti teimum yngru, hvussu tú skalt gera, tá tú kemur leysur ímóti málmanninum. Men hann fekk tó ikki síðsta orðið í dystinum, sum framvegis var meira opin, enn 2-0 kundi bent á.

### Vent í holuni

Fuglfirðingar vóru ikki til at kenna aftur, tá teir komu á vøllin eftir steðgin, og serliga vóru teir drúgvari í nærdystunum. Í fyrra hálvleiki høvdu teir á heimaliðnum verið fyrstir á flestu bóltum, men nú var vent í holuni, og serliga á miðvøllinum vann ÍF sær greiða yvirvág.

At hetta loysti seg, gekk sjón fyri søgn fáar minuttir inn í seinna hálvleik, tá Øssur Dalbúð, sum sá merkiliga leysur út, slepp at kasta seg fram eftir einum frísparksbólti og smekka hann í málið, so nú var bara eitt mál á muni. Og sum nevnt, so var trumfurin settur á, tá Dánjal á Lakjuni kom inn, tí honum fingu teir í 07 Vestur ongantíð ordiliga fatur í.

Somuleiðis hevði ÍF eitt hav av deyðbóltsstøðum, men hóast gestirnir sótu á tí mesta í næstan allar 45 minuttirnar, so gjørdi 07 Vestur ein vørr ímóti endanum, ið kundi havt við sær, at øll trý stigini blivu eftir í Sørvági.

Fyrst slapp Tamba Yarjah einsa-mallur ímóti Andras Gango, ið tó fekk lúrt hann av og tikið bóltin, tá Yarjah royndi at lobba. Og eisini slapp Ricardo í góða støðu, ið tó einki gav, tí Pól Ennigarð onkurs-vegna fekk taklað skotið í evstu løtu, heilt inni á fimmmetrinum.

Fyri 07 Vestur var 2-2 javnleikurin eitt afturstig, eftirsum KÍ vann óvæntaðan sigur á Toftum, meðan ÍF hinvegin mundi síggja úrslitið sum eitt framstig, so fuglfirðingar nú munnu kenna seg rímiliga tryggar í, at tað verður Vodafone-deildarfótbóltur aftur næsta ár.



**Framherjin hjá 07 Vestur, Tamba Yarjah, er her við undirlutan í duell við ÍF-miðverjan, Pól Ennigarð, í dystinum í Sørvági í gjárkvøldið**

**Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir**

## Vit mugu vinna rest

Eftir javnleikin ímóti ÍF í gjárkvøldið, er 07 Vestur aftur aftast í Vodafonedeildini, tvey stig aftan fyri KÍ, og sostatt er trýstið á vágaliðið ikki blivið minni, nú bara trý umfør eru eftir.

– Vit hava kent trýst á okkum nokk so leingi, men nú vænti eg, at fáa vit ikki øll níggju stigini, ið eftir eru at spæla um, so er lítil møguleiki fyri at yvirliva, sigur Johan Petur á Stongum, sum ikki spælir fleiri dystir í ár fyri 07 Vestur, tí hann í dag verður lagdur undir skurð fyri ein gamlan skaða í økslini.

– Eftir at vit høvdu verið á odda 2-0 í hálvleikinum, trýsti ÍF okkum í botn í seinna hálvleiki, og eftir avrikinum kunnu vit vera glaðir fyri hatta eina stigi, tí satt at siga, so høvdu vit ikki uppiborið at fingið trý stig hesa ferð.

**Hil**

## Fantastiskt at fáa javnt

– Vit eru sera fegnir um, at vit eftir ein vánaligan fyrra hálvleik, har vit vóru aftanfyri, megna at koma afturíaftur í seinna hálvleiki og fáa javnleik. At vit so fingu javnleik, var heilt fantastiskt, sigur bert 18 ára gamli ÍF-arin, Dánjal á Lakjuni, sum var skiftur inn síðsta hálva tíman og fekk skotið útjavnandi málið.

– Í fyrra hálvleiki vóru teir betri, hóast vit høvdu okkara kjansir, men bara ikki skoraðu upp á teir. Eftir steðgin vóru vit út á vøllin sum eitt nýtt lið. Vit máttu royna at vinna bóltarnar, tí vit vóru alla tíðina seinni á bóltinum enn teir í fyrra hálvleiki, og tað eydn-aðist okkum eisini.

Sunnudagin er mótstøðu-liðið HB, sum roynir at røkka meistaraheitinum, men HB skal ikki vænta sær nakra hjálp frá ÍF.

– Vit fara eftir trimum stigum, tí vit mugu hugsa um okkum sjálvar og ongan annan, sigur Dánjal á Lakjuni.

**hil**